## EG MEINI TAÐ

# Mentanartarnaða kjakið



*Bergur Rasmussen skrivar:*

Føroyar munnu vera verðins besta samfelag, tí eitt samfelag, sum ikki kann kjakast um annað enn bubbur og bróst og ginur og píkadekk, má vera fullkomið. - Friður valdar, lukka!

Øll tey stóru málini sleppa at ganga sína gongd meir ella minni í loyndum - okkurt hissini gleps hoyrist av og á um dálking og svik, mutur og ógegnligheit, men vit hava líkasum ikki yvirskot til alt hetta, tí vit eru so upptikin av at dyrka ta serligu perverteraðu føroysku voyeurismuna, sum er grundað á tankan um, at tjóvur heldur, at hvør maður stjelur.

Men tá ið tað kemur har til, at vaksin fólk ikki sleppa at vera vaksin í friði og náðum inni hjá sær sjálvum, tá ið gardinurnar eru trektar fyri, haldi eg, at man eltir eina vandamikla slóð, sum gongur beint móti bókabrenning og sjallum og síðum kjólum.

Og er tað tað, teir, sum rópa harðast um mentanarligu grundvirðini hjá tjóðini, vilja hava? Hví ætla teir annars at taka ábyrgdina frá vaksnum fólki við at innføra sensur á bæði einum og øðrum? - Og hvat vænta teir at fáa burturúr tí?

Eitt sakloysisins leikaland, har børnini í markleysum ovfarakæti trúgva øllum, sum tey vaksnu siga, og har prestur er umboðsmaður guds á foldum, og lærarin sleppur at tukta tey, hann elskar, og idealkvinnan er hønumamman, sum altíð er inni, tá ið elskulingurin hevur skurðslað seg og hevur brúk fyri ugga og troyst og einum bita við putursukri?

Tað ljóðar kanska mikið hugnaligt, men sjálvt ikki í leikalandi skínur sólin hvønn dag, og hvat sigur man so, tá ið knubsini koma? - At tað er tann ónda drottningin, sum hevur alla skyldina? At tað er tann stóri risin?

Í Nuuk skipa tey í vetur á fyrsta sinni fyri foreldraskeiði, har foreldur við vánaligari sosialari bakgrund fáa undirvísing í foreldrarollum og ábyrgd, so tey fáa ein kjans at bróta burturúr teirri tómgongd av neyð og elendigheit, sum tey hava livað við alt lívið. - Hetta verður alt gjørt fyri at kor barnanna skulu betrast.

Trivnaðarráðið átti kanska (saman við Mentamálaráðnum?) at skipa fyri einum tílíkum foreldraskeiði í Føroyum, har ósikkur vaksin lærdu seg at tosa við børnini, tá ið tey koma og spyrja um kropsfunktiónirnar? - Tað hevði í øllum føri verið betri loysn enn at sláa á fingrarnar á barninum, um tað fylgir sínum náttúrliga forvitni.

Ólukkulig børn hava tað við at gerast ólukkulig vaksin, sum tankavekjandi tilverusendingin um prostitutión visti at siga. Og vit eiga at spyrja okkum sjálvi, um vit sum eitt framkomið samfelag ikki eiga at stríðast ímóti, at smáir menn við lítlum sjónarringi - ólukkuligir smádreingir? - sleppa at forða kunnleikanum, opinleikanum og tryggleikanum at virka, fyri at seta óvitið, tað fjalda og ræðsluna ístaðin. - Hetta fyri at tiga ein sannleika ígjøgnum.

Tí tann sannleikin, ið má tigast ígjøgnum man vera heldur ivasamur ...

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

# Rossá vatnbrunnur burtur

Leila á Lofti hugleiðir og harmast um gamla vatnbrunnin í Fossá á Argjum, sum í summar varð javnaður við jørðina

MINNI
*Leila á Lofti*

At hjálpa mær við hesi grein havi eg fingið Sverra Mortensen, uppi á Geil og ommu mína, Dinnu Dalsgarð, á Bakkagøtu.

Í gomlum døgum var vanligt at brúka áirnar dagliga, vatnið bleiv borið inn í húsið úr nærmasta vatnbrunni, ella bleiv tunna eisini nýtt sum vatngoymsla. Taka vit áirnar frá gomlu Argjum og heimeftir kunnu vit nevna Borgá, Matará, Tváttá, Rossá og Sandá.

Í 1948 tóku nakrir Argjamenn seg saman fyri at fáa ein felags vatnbrunn til tey heimaru húsini í bygdini.

Olaf Mortensen, arkitektur, ið m. a. hevur teknað Telefonverkið og Studentarskúlan, gjørdi tekningina av brunninum við Rossá umleið 1948.

Teir, ið gjørdu Rossá vatnbrunn vóru:
Niels Holm Mortensen, formaður
Andrias Mortensen (Dia)
Ólavur Dalsgarð
Jacob Pauli Joensen (Norðskála Palli)
Valbjørn Dalsgarð
Jacob Mortensen (Jáku hjá Herthu)
Kristoffur Joensen
Ole Edvard Olsen (kiosk Óli)
Hans Jákup Hansen (Kollfirðingurin)
Arnold Dam

Um hetta mundið vóru 50 hús á Argjum og 250 íbúgvar.

Avgjørt var, at gjaldast skuldi eitt íbindingargjald áljóðandi 800,00 krónur, og skuldi brunnurin geva 25 húsarhaldum vatn.

Rossá vatnbrunnur virkaði í umleið 10 ár. Nú er bygdin vaksin so nógv, Fransá vatnverkið er liðugt og tekur við í 1958, og bleiv tá Rossá vatnverkið niðurlagt.

At eg skrivi hesa greinina, hevur sjálvandi sína grund, og er hon í høvuðsheitinum mín ónøgd við, at Rossá vatnbrunnur í summar bleiv javnaður við jørðina.

Hví, kunnu so bert tey menniskju, ið ábyrgdast hesi ógerð, greiða frá. Enn syrgiligari er, at virðingin fyri tí gamla, og teimum sum stríðst hava, er so lítil.

Abbi mín, Ólavur Dalsgarð, var ein av teimum, ið gjørdi brunnin. Eins og allir hinir, so hevði hann eitt strævið lív, har var ikki nógv tíð til yvirs; men hóast tað, so stríddist hann saman við hinum argjamonnunum kvøld eftir kvøld, fyri at lætta um hjá konu og børnum.

Síðani vegurin kom út á Glyvursnes, havi eg so mangan steðgað á við brunnin bert fyri at hugsa eina løtu og við takksemi gleðast um abba og allar hinar, ið farnir eru. Brunnurin hevur staðið har sum ein partur av nýggjari søgu, uttan at vera til fortreð yvirhøvur.

Børn læra av at spyrja: »hvat er hatta?«

Taka vit allar minnisvarðar burtur, so verða tey ta vitan fátækari, vitan, ið hevði givið teimum kensluna av at vera ein partur av tí, ið verið hevur.

Skuldi eg enda hesa grein við egnum orðum, so vóru orðini til tey, ið hava ábyrgdina av hesum ógerningi: »Skamm fái tykkum so dyggiliga«. Men eg endi heldur við orðunum hjá Sverra Mortensen:

»…og soleiðis fer so mangt í gloymskunnar hav«



*Natasha, langabbadóttir Ólav Dalsgarð, við Rossábrunnin áðrenn hann var javnaður við jørðina í summar…*
*Mynd: Hallgerð á Lofti*



*…og soleiðis sær økið nú út, har brunnurin stóð*
*Mynd: Leila á Lofti*





*– Jødahatur er framvegis vanligt í heiminum, og bæði beinleiðis og óbeinleiðis kemst tað av læru kirkjunnar. Bara í Evropa eru tað milliónir av katolikkum, sum siga, at tað vóru jødarnir, sum beindu fyri Jesusi Kristi*

# Nýggjar bøkur um lutin hjá katólsku kirkjuni undir seinna heimsbardaga

Tvær nýggjar bøkur um ta katólsku kirkjuna og jødatýningina undir seinna heimsbardaga hava elvt til nógv orðaskifti í Týsklandi og Eysturríki. Í hvussu er onnur teirra kann elva til ovurstór endurgjaldskrøv ímóti Vatikaninum.

NýGGJ BÓK
*Árni Joensen*

Amerikanski rithøvundurin Daniel Goldhagen hevur aftur gjørt vart við seg. Goldhagen, sum er av jødiskari ætt, gjørdist kendur víða, tá hann fyri seks árum síðani legði allar týskarar undir at hava gingið Hitleri til handa undir seinna heimsbardaga. Tað er heldur einki at ivast í, at hann eisini verður umrøðuevni, nú hann í nýggjari bók "avdúkar" sambandið millum ta katólsku kirkjuna og gamla nazistastýrið í Berlin.

Líka síðani í sekstiárunum hevur Vatikanið roynt at bera í bøtuflaka fyri leiklutin hjá katólsku kirkjuni í stríðsárunum, tá Pius pávi 12. og nógvir av biskupum hansara tigandi hugdu at og góðtóku nazistisku jødatýningina.

Tað nýggja við bókini hjá Daniel Goldhagen er krav hansara um, at tann katólska kirkjan eigur at lata eitt moralskt endurgjald fyri tað, sum hann rópar medábyrgd og husjónarligan stuðul til jødatýningina.

### Líka sek

Kendi amerikanski endurgjaldssakførarin Ed Fagan er longu farin til verka. Fyri tveimum árum síðani eydnaðist tað honum at noyða týskar og eysturríkskar stórfyritøkur at rinda fleiri milliardir krónur í endurgjaldi til fólk, sum høvdu arbeitt sum trælir hjá fyritøkunum undir seinna heimsbardaga. Tað var eisini Ed Fagan, sum fekk tað annars so trygga sveitsiska samfelagið at skelva, tá hann reisti endurgjaldskrav ímóti bankum og fyritøkum vegna fólk, sum høvdu verið offur fyri týsku jødatýningini.

Hann er heldur ikki í iva um, at tann katólska kirkjan eigur at rinda endurgjaldskrav.

- Katólska kirkjan er minst líka sek sum bankarnir og stórfyritøkurnar, og eg eri sannførdur um, at hon fer at fáa fleiri krøv um endurgjald. Katólska kirkjan er tann ríkasti stovnurin í heiminum, segði Ed Fagan í samrøðu við eysturríkska tíðarritið Format herfyri.

### Bíblian má umskrivast

Sjálvur sigur Daniel Goldhagen, at nýggja bók hansara er ikki ein ákæra ímóti katólsku kirkjuni, men heldur ein moralsk kanning. Men ivaleyst fer hann í so langt, tá hann í bókini mælir teimum kristnu samfeløgunum til at endurskriva Bíbliuna og at nýta sínar egnu niðurstøður sum grundarlag fyri einari broyttari Bíbliu. Eftir hansara tykki eigur alt tað, sum ber á tað antisemittiska borðið, at verða strikað úr Bíbliuni.

- Jødahatur er framvegis vanligt í heiminum, og bæði beinleiðis og óbeinleiðis kemst tað av læru kirkjunnar. Bara í Evropa eru tað milliónir av katolikkum, sum siga, at tað vóru jødarnir, sum beindu fyri Jesusi Kristi. Skal kirkjan veita tað neyðuga moralska endurgjaldið, er tað er fyritreyt, at hon gevst at boða hatur til jødarnar, soleiðis sum gjørt verður í teirri kristnu Bíbliuni, sigur Daniel Goldhagen.

### Uppaftur ein bók

Nýggja bókin hjá Daniel Goldhagen, "Die katolische Kirche und der Holocaust", er givin út í Berlin, men týsku ummælararnir hava ikki verið mjúkir at strúka. Ummælarin hjá blaðnum Súddeutsche Zeitung helt, at bókin snýr seg meiri um hevnd, skyld og endurgjald enn um søguligan sannleika, og ummælarin hjá Der Speigel helt, at tað var eitt mistak hjá høvundinum at legggja alla ta katólsku kirkjuna undir jødahatur heldur enn teir einstøku leiðararnar í kirkjuni.

Í tí katólska Eysturríki hevur bókin vakt størri ans enn í Týsklandi, og tað ger ikki støðuna betur, at ein onnur bók um lutin hjá eysturríksku kirkjuni undir seinna heimsbardaga eisini er komin út. Høvundurin, Stefan Moritz, hevur eisini sagt, at katólska kirkjan nýttir ymsar snildir fyri at forða sær í at fáa fatur á teimum neyðugu skjølunum, sum hann skuldi nýta til bókina. Stefan Moritz sigur seg vera púra samdan við Daniel Goldhagen í, at Vatikanið ger alt, sum gerast kann, fyri at halda skjøl frá stríðsárunum loynilig.

Tær báðar bøkurnar hava fingið ymsar fjølmiðlar at róta í søguni. Eitt nú almannakunngjørdi tíðarritið Format nýliga skjøl, sum prógva, at tann katólska kirkjan í Eysturríki visti um nazistisku jødamorðini longu í 1940, men at kirkjan ikki rætti hond frá síðu og tíansheldur segði nakað.